Klaksvíkingar fara eisini á mentanarstevnu

Í mánadagsblaðnum vóru tíðindi um Norðurlendskir mentanardagar, sum verða í døgunum 28. august - 12. september í Lemvig og Thyborøn - Harborøre í Danmark.

Stevnan hevur fingið heitið "Nordvest 1993" og nógv og ymisk feløg eru við í fyrireikingini. Eitt nú Norrøni Eftirskúlin stendur fyri einum parti av føroysku tiltøkunum.

Eisini klaksvíkingar fara niður á stevnu. Klaksvíkar Sjónleikarfelag og Klaksvíkar Dansifelag hava boðað frá luttøku.

Jacobina Heinesen í Klaksvíkar Sjónleikarfelag, sigur við Sosialin, at eini 40 fólk í Klaksvík fara til Danmarkar fríggjadagin - 20 dansifólk og 20 sjónleikarar, sum skulu framføra føroyskan dans og sjónleik.

- Ætlanin er at framføra brot úr sjónleikinum "Gandaferðini", sum klaksvíkingar spældu sum útileik á ólavsøku fyri tveimum árum síðani. Nógvir leikarar eru í hesum leiki, men av tí at dansifelagið eisini luttekur, hava vit lagt framførslurnar soleiðis til rættis, at dansifólkið er við í sjónleikinum, og sjónleikarar eru við í dansinum.

- Vit hava vant nógv í seinastuni, og gleða okkum nógv til ferðina, sigur Jacobina Heinesen.

Norðurlendsku mentanardagarnir í Jútlandi eru ikki gjørdir eftir fáum døgum. Arbeitt hevur verið við fyrireikingini í meir enn ár.

Úr Klaksvík frættist, at Michael Böss, prejekleiðari, var í Føroyum fyri góðum ári síðan, har hann setti seg í samband við feløg og leikbólkar í Føroyum.

Hann var eisini í Klaksvík og greiddi frá, og seinni fingu tey innbjóðing at luttaka á stevnuni.

Luttakarnir hava fingið stuðul úr Danmark og frá MáF, sum eisini hevur sent klaksvíkingum leikstjóra, eins og NAR hevur fíggjað sín part. NAR er Norðurlendska menginfelagið fyri áhugaleikarar.

Klaksvíkingarnir skulu búgva á skúla í Lemvig.

Dagny

Bilar til sølu

TOYOTA COROLLA 1300 DX, Sedan, árg. 84 og TOYOTA COROLLA 1300 vøruvognur, árg. 81 – til sølu.

Tlf. 18383 – 12471

Rætting

Í Sosialinum í gjár var prát við Mary í Garði, civiløkonom, sum er sett í starv at taka sær av játtanareftirlitinum og innternari grannskoðan á Landssjúkrahúsinum.

Eitt brot í greinini er komið skeivt fyri, sum er um viðurskiftini hjá sjúklingum og starvsfólkunum.

Mary í Garði sigur í rættingini, at hon er so nýggj í starvinum, at hon ikki enn hevur nakra meting um hesi viðurskifti, og vísur á rætta svarið, sum stóð omanfyri í somu grein:

(- Eg havi enn onga meting um, hvussu ella á hvønn hátt sparningarnar ganga út yvir sjúklingarnir. Starvsfólkini hava meir um at verða og renna sjótari enn áður.)

Vit biða Mary í Garði umbera hetta mistakið.

Blkv.

Ikki neyðugt at umleggja lánini

Tað hevur ørkymlað nøkur fólk, at Húsalánsgrunnurin hevur fingið nýtt brævpappír.

Tá stovnurin í summar sendi frásøgn/áminningarskriv til viðskiftafólkið, skiltu nøkur hetta bert sum eitt upplýsandi skriv, sum tey goymdu í ringbindinum.

Dagin eftir kom nýtt skriv, av tí at feilur var í útrokningini hjá Elektron í tí fyrra, og her var framvegis sama brævpappír nýtt.

Eydna Viderø á Húsalánsgrunninum, sigur við Sosialin, at stovnurin ikki hevur havt serliga nógvar trupulleikar av hesum, og at flestu viðskiftafólk skiltu brævið, hóast tað ikki var skrivað á sama pappír og støddi, sum áður.

- Hereftir verður bert eitt eintak sent út til fólk, og hetta er ífakturastødd, ístaðin fyri vanligu bankakvittaninar í trimum eintøkum.

- Annars ringja nógv fólk, sum vilja gjalda eina ferð um mánaðin, ístaðin sum higartil fýra ferðir árliga.

Fólk hava onkusvegna skilt, at lánini skulu leggjast um, fyri at hetta skal kunna lata seg gera, men tað er ikki neyðugt.

Fólk skulu bert avtala við egna peningastovn, um tey vilja gjalda eina ferð um

mánaðin. Ikki er neyðugt at leggja lán um ella annað tílíkt. Heldur ikki er neyðugt at ringja ella skriva til Húsalánsgrunnin.

Hevur peningastovnurin fingið boð um broytingar, verður hetta gjørt beinanvegin.

Dagny

»Nærri mín Gud til tín«

Heimsskútan søkkur, men kongadømi friðarins vinnur.
Finn leiðina til samfelagið við Gud og tín næsta.
Økeypis upplýsingar:

Universal Life
Dept. 6.26, P.O Box 5643, 8700 Würzburg Germany

Storno

900 MHZ
vigar bert 235 gr.

Storno
Handan Á 6 - Tórshavn
Tlf. 14414 - Fax. 18045

GoldStar summartilboð



25" litsjónvarp / CBT 2570T
Deluxe stereolook, FST myndarør, tekstsjónvarp v/ fastteksti og blaði-/leitiskipan, 40 rásir, Nicam stereo 2 x 10 w, infraljósstýrd fjarstýring og alskyns aðrir hentleikar. Stutt sagt »**framtíðar sjónvarpið, ið kann alt**«.

Kontant bert **8.775,-**

Videobandspælari GSE G10P
40 programpláss, 8 skráir í 1 ár, QSR upptøka upp í 9 tímar, ant. tendr./sløkkja, kvik-start, aut. spoling, avspæling v. dupultari ferð, snarleitiskipan / 7 x vanl. ferð. VISS - VHS-leitiskipan, teljari v/ tíðarávísing, umframt aðrar hentleikar.

Kontant bert **2.995,-**

SatrOnic
Box 49 - 600 Saltangará - Tlf. 48940 - Fax. 48947